betri

# Ferðatrygging

**Við okkara ferðatrygging fylgja vit tær allastaðni, um tú verður sjúk/ur ella fært skaða. Eisini um tú knappliga skalt innleggjast uttanlands ella hevur tørv á at koma skjótt og trygt heim.**

**Hvat fevnir tryggingin um**
Ferðatryggingin fevnir um nógv ymiskt, og nakrir av fyrimununum við okkara ferðatrygging eru:

- Tú fært óavmarkað endurgjald, um tú fært skaða ella verður sjúkur og skalt flytast heim
- Um tú gerst sjúkur ella fært skaða, kanst tú fáa samkensluvitjan av trimum fólkum eftir egnum ynski
- Atgongd til læknaráðgevar hjá SOS
- Endurgjald fyri sjúkraviðgerð av øllum sløgum av ítróttarskaðum

Ferðatryggingin fevnir sjálvandi eisini um:
Fylgi við sjúklingi, ferðaslit, evakuering, kreppuhjálp, skaða á viðføri, viðførisseinkan v.m.

Ætlar tú tær at íðka ítrótt á ferðini og verður sjúkur ella fært skaða, og hetta forðar tær í at íðka ætlaðu ítróttina, fevnir tryggingin eisini um tær eykaútreiðslur, tú fært, um tú t.d. hevur leigað tær útgerð fyri at kunna íðka ítróttina. Endurgjald verður latið upp til eina ávísa upphædd.

**Trygging eftir tørvi**
Tú kanst velja tína ferðatrygging soleiðis, at hon hóskar til tíni ynski og tín tørv.
Tú kanst velja millum trý sløg av ferðatryggingum, **Ársferð**, **Einstøk ferð** ella **Bólkaferð**. Harumframt hevur tú møguleika at tekna tær eina Avlýsingartrygging.

Uttan mun til hvørja av hesum tú velur tær, avgerð tú sjálv/ur, um tryggingin skal fevna um Norðurlond/Stóra Bretland, Evropa ella allan heimin.

Yvirlit yvir, hvørji lond ella økir eru fevnd av okkara ferðatrygging finst á betri.fo.

**Ársferðatrygging**
Um tú ferðast javnan, so loysir tað seg at tekna eina Ársferðatrygging. Ársferð verður teknað sum ískoyti til Innbúgvstryggingina.
Hvør ferð kann vara upp til 60 dagar, og tú kanst fara avstað so ofta tú vilt. Skalt tú burtur í meira enn 60 dagar í senn, kanst tú víðka tryggingina.

Ársferð fevnir um allar privatar ferðir við óavmarkaðum endurgjaldi fyri sjúku/skaða og heimflutning. Tryggingin fevnir um alt húskið.

Um tú ert uttanlands í vinnuørindum, har nakrir dagar eru í privatørindum, so eru dagarnir í privatørindum eisini umfataðir av Ársferðatryggingini.
Hevur tú Ársferðatrygging, kanst tú keypa eina Avlýsingartrygging sum ískoyti. Við Avlýsingartrygging fært tú ferðakostnaðin endurrindaðan, um tú av ávísum orsøkum noyðist at avlýsa ferðina áðrenn fráferð.

**Einstøk ferð**
Einstøk ferð fevnir um einstøku uttanlandsferðina í privat- ella vinnuørindum. Henda tryggingin hóskar væl til tín, sum ikki hevur Ársferðatrygging ella ikki ferðast javnan, ella tá tú, hóast tú hevur eina Ársferðatrygging, skal á eina einstaka ferð, sum ikki er ein frítíðarferð. Einstøk ferð fevnir um allar ferðir við óavmarkaðum endurgjaldi fyri sjúku/skaða og heimflutning.

Einstøk ferð fevnir um viðføri upp til 30.000 kr. Til ber at hækka tryggingarhæddina.

**Bólkaferð**
Eitt ferðalag við 10 fólkum ella fleiri, ið skal uttanlands, kann tekna eina Bólkaferðatrygging. Hetta gevur bólkinum sama dekning, sum Einstøk ferð - men við munandi avsláttri.

**Avlýsingartrygging**
Tú kanst eisini fáa tær eina Avlýsingartrygging, ið gevur endurgjald, um tú av ávísum orsøkum noyðist at avlýsa ferðina áðrenn fráferð.

Møguleiki er eisini at víðka um Avlýsingartryggingina til eisini at fevna um serstøk tiltøk, sum tú skalt til uttanlands, eitt nú eina konsert ella eitt ítróttartiltak. Verður tiltakið avlýst, verður endurgjald latið sambært upphæddini, tú hevur upplýst, at ferðin og tiltakið kostar.
Ferð við ávísum ferðaleiðara er eisini eitt ískoyti til Avlýsingartryggingina. Um ferðaleiðarin má avlýsa ferðina orsakað av sjúku v.m., fært tú endurgoldið tað, tú hevur upplýst, at ferðin kostar.

**Hvussu verður tryggingin teknað**
Tryggingin verður teknað hjá Betri Trygging ella á einari ferðaskrivstovu.

betri

# Ferðatrygging

**Fá meira at vita**
Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um hesa trygingina. Vilt tú vita meira um tryggingartreytirnar, kanst tú finna tær á heimasíðu okkara betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600, og fáa nærri vegleiðing frá einum av okkara ráðgevum.